# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Nógvir áskoðarar hava fyri langari tíð síðani bílagt pláss, og bæði gistingarhús og camping-pláss eru at kalla fullsett*
*Ingigerð á Trøðni, Kunningarstovan*

# Øll vilja síggja Italia

**Øll vilja síggja Føroyar spæla móti heimsmeistarunum. Longu fyrsta dagin seldi FSF 2.500 atgongumerki**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Skal metast eftir fyrsta søludegnum, so kundi Tórsvøllur verið væl og virðiliga fyltur meira enn tí einu ferðina, nú heimsmeistararnir koma á vitjan*

Sannur telefonstormur var á skrivstovuni hjá Fótbóltssambandinum í gjár. Atgongumerkini til dystin móti Italia vórðu nevnliga sett til sølu í gjár, og longu nú tykist púrasta greitt, at Tórsvøllur verður stúgvandi fullur.

Ísak Mikladal, aðalskrivari, sigur, at hendan fyrsta dagin seldu teir 2.500 atgongumerki.

- Hetta er fyrsta ferðin, at vit selja atgongumerki við núverandi skipan, har fólk eisini ringja inn. Tí fáa vit ikki reiðiliga sammett søluna hesa ferð við aðrar dystir. Men eg fái sagt somikið, at vit eru væl nøgd við áhugan frá áskoðarunum, sigur Ísak Mikladal.

Hóast aðalskrivarin ikki vil staðfesta tað, so er mest sum eingin ivi um, at talan verður um fullsettan Tórsvøll til dystin. Íalt er talan um 6.000 atgongumerki. Partur av hesum eru eyðmerkt til sponsorar og VIP'arar hjá bæði Tórsvølli og FSF, eins og Italia eisini eigur rætt til nøkur atgongumerki. Tað vil við øðrum orðum siga, at úti við helmingurin av tøku atgongumerkjunum vórðu mest sum rivin burtur longu fyrsta dagin.

## Gott fyri roknskapin

Og tað er einki at ivast í, at góða sølan kemur væl við í pengakassanum hjá FSF. Árið í gjør hilnaðist einki serligt fíggjarliga. Serstakliga vóru tað fallandi áskoðarainntøkur, ið kostaðu á botnlinjuni, sum sýndi eitt hall á góða hálva millión.

Samanlagt vóru áskoðarainntøkurnar í 2006 772.000 kr., men bara Italia-dysturin gevur helst væl meira enn hetta. Runt roknað, so gevur ein fullsettur Tórsvøllur um eina millión í kassan, og so er FSF longu væl ávegis eini javnvág í inntøkum og útreiðslum.

Og aðrir góðir kassadystir standa eisini fyri framman. Bara fýra dagar eftir Italia stendur Skotland á skránni, og í heyst kemur eisini Frakland hendavegin.

-Atgongumerkini til Skotlands-dystin eru eisini sett til sølu. Og nøkur hava nýtt høvið at keypa sær sess til báðar dystirnar. Tó eru hesi ikki eins nógv í tali, sum tey eru til Italia-dystin, sigur Ísak Mikladal.

Men heldur ikki her man nakar ivi vera um, at áskoðararnir verða hampuliga nógvir í tali. Bæði tí Føroyar ofta hava staðið seg sera væl móti Skotlandi. Og ikki minst tí skotar sjálvir fylgja væl við landsliði sínum. Soleiðis verður á FSF-skrivstovuni roknað við, at skotskir áskoðarar keypa á leið 700 atgongumerki.

# Fullsett um alt landið

**700 skotar og 150 italiumenn skulu hýsast, nú fótbóltslandsliðið stendur fyri tveimum av stóru dystum sínum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað merkist á øllum gistingarstøðum kring landið, at stórdystir hjá Fótbóltslandsliðnum standa fyri framman.

Italiumenn hava á leið 150 áskoðarar við sær, tá teir skulu spæla á Tórsvølli tann 2. juni, men stóra innrásin kemur beint eftir hetta, tá á leið 700 skotar vilja sleppa á Svangaskarð at síggja sínar landsmenn. Háarstíð er fyri ferðavinnuna, og tá Hotel Føroyar samstundis er bookað av landsliðsspælarum, gevur hetta sjálvandi nakrar praktiskar trupulleikar.

- Tað hava vit sjálvandi merkt. Nógvir áskoðarar hava fyri langari tíð síðani bílagt pláss, og bæði gistingarhús og camping-pláss eru at kalla fullsett, sigur Ingigerð á Trøðni, leiðari á Kunningarstovuni í Havn.

Fyri trimum árum síðani – tá Írland vitjaði – var at kalla undantaksstøða hjá Kunningarstovuni. Við at seta lýsingaráheitanir til privatfólk í bæði skrivaðar og loftbornar miðlar eydnaðist tó at hýsa øllum áskoðarunum, og Ingigerð útilokar als ikki, at tað verður neyðugt við somu átøkum.

- Tað fáa vit at síggja. Bíleggingarnar eru í øllum førum nógvar kring alt landið, so tað kann væl verða, at vit enn eina ferð mugu seta álitið á gestablídnið hjá føroyingum.

## Rætting um svimjigrein

Í grein í blaðnum í gjár skrivaðu vit um avgerðina hjá Peturi Heðin á Fløtti, sum ikki vildi ímóti heitinum sum ársins venjari. Í greinin varð millum annað endurgeving frá heimasíðuni hjá Svimjisambandinum, men hetta var tó komið skeivt fyri. Viðmerkingin var endurgevin frá svimjing.com, og hendan síðan er IKKI tann hjá Svimjisambandinum. Í Svimjisambandinum siga tey annars, at tey einki hava við handanina av virðislønunum at gera, men at hetta er nakað, sum feløg og venjarar standa fyri.

*-mørk*

## Sjónvarpslið á bíðlista

**Í týskum sjónvarpi vilja tey fegin gera sendingar um Føroyar og føroyskan fótbólt. Trupulleikin er tó í løtuni, at rúm er ikki fyri sjónvarpsliðnum, ið telur 30 fólk**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn eina ferð setir fótbóltslandsliðið Føroyar á heimskortið. Italskir og skotskir miðlar vísa í hesum døgum oyggjum okkara stóran ans, og eisini í Týsklandi vilja tey fegin nýta komandi landsdystirnar til at seta fokus á oyggjar okkara.

Soleiðis hevur ein týsk sjónvarpsstøð boðað frá, at tey senda eitt sjónvarpslið hendan vegin fyrstu vikuna í juni, men í løtuni er óvist, hvørt tað eydnast at hýsa teimum 30 fólkunum allar dagarnar.

- Helst vilja tey á sjónvarpsliðnum búgva í Havn, men tað tykist mest sum ógjørligt. Tað er tó rúm fyri teimum á Hotel Eiði í nakrar, men seinastu dagarnar av ferðini mugu vit finna aðrar møguleikar, sigur Ingigerð á Trøðni, sum er leiðari á Kunningarstovuni í Havn.

*-mørk*

## GÍ-formaðurin farin frá

Á aðalfundinum fekk Janus Rasmussen ikki undirtøku fyri at leggja saman við LÍF

Tað veit Norðlýsið at siga. Tað hevur ljóðað leingi, at samband hevur verið millum GÍ og LÍF um møguliga samanlegging. Og eftir øllum at døma er hetta prát enn ikki liðugt.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa viðmerking frá Janusi Rasmussen, men nýggi formaðurin, Andreas Poulsen, sigur við Norðlýsið, at vantandi undirtøka fyri eini samanlegging her og nú var orsøkin til, at Janus segði seg úr formanssessinum.

*-mørk*